## Mercedes Benz 200 D



Árgang 1966, koyrt 88.000 km, reyður, diesel. Ellisakfar í góðum standi. Bilurin er høvuðsumvældur og lakkeraður fyri trimum árum síðani.

## Opel Kadett



Árgang 1973, einans koyrt 54.000 km, reyður, bensin. Bilurin er í sera góðum standi. Hevur havt ein eigara tey fyrstu 28 árini.

## Mercedes Benz 280 CE



Árgang 1978, koyrt 104.000 km, gráur, bensin, 185 HK, 2800 cc, 6 cyl. rekkjumotor.
Bilurin er í góðum standi.

☎ **Ringið 216409**

# TFT útbúgving

**byrjar 26. og 27. november 2005.**

**Enn er pláss.**

Hjálpir móti strongd, tramaum, fobium, angist, tunglyndi, alkoholmisnýtslu royking og mongum øðrum.

Meira fæst at vita um TFT-viðgerðarhættir á:

www.tftdanmark.dk ella við at ringja á tel 31 8821

KAGGIN

# Frítíðarfelagið Kaggin

**Dalavegur 1, 100 Tórshavn**

Innkalling til eykaaðalfund í hølum felagsins

**hóskvøldið 10. november 2005 kl. 19.00.**

Vegna sjúkur og serligar umstøður verður innkallað til eykaaðalfund fyri at fullmanna nevndina aftur.

**Tað eru 2 punkt til eykaaðalfundin**
Punkt 1: Val av eykalimum fyri at fullmanna nevndina
Punkt 2: Broyting í §5a lógum felagsins
Í nevnd kunnu veljast øll, sum eru limir (hava goldið limagjald); tó undantikið lønt starvsfólk.

Vinarliga møti fjølment til fundin

**Nevndin**

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

## HUGNALØTA VIÐ FYRILESTRUM

BÓT TIL BATA SKIPAR FYRI HUGNALØTU VIÐ ALMENNUM FYRILESTRUM Á HOTEL HAFNIA

Eliesar Olsen, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, heldur fyrilestur um skurðviðgerð av bróstkrabba. Eisini fer hann at røða um nýggjastu viðgerðarhættirnar og um møguleikar fyri at varðveita bróstini umframt endurnýggjan ella endurgerð av skurðviðgjørdum brósti.

Inga Poulsen Dam, prestur, heldur fyrilestur um lívsdygd í sambandi við lívshóttandi sjúku

Paula Jespersen úr sangbólkinum SALT fer at syngja og Arnvør á Torkildsheyggi spælir undir

HUGNALØTAN VERÐUR
Á HOTEL HAFNIA
LEYGARDAGIN 29. OKTOBER KL. 15.00
ØLL ERU HJARTALIGA VÆLKOMIN

BÓT TIL BATA

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

# Norðoya Forminnasavn

Frá 1. november til 15. mai verður øll avgreiðsla á savninum bert mánadag kl. 9 - 16.

Tlf. /Fax: 456287, e-post: noforn@kallnet.fo.

**Norðoya Forminnasavn**

SEV

# Elverkfrøðingar

## søkjast til

# Elfelagið SEV

Eitt fast starv og eitt tíðaravmarkað starv sum elverkfrøðingur eru leys at seta.
Meðan fasta starvið ikki er avmarkað í tíð, verður avloysarastarvið at seta til 1. september 2006 fyri verkfrøðing í farloyvi.

**Starvið:**
Talan er um størv innan býtisvirkini hjá SEV, sum umfata linjukervið, trafostøðir, innleggingar-eftirlit o.a. kring landið.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjararnir hava elektroverk-frøðingaprógv. Tað er ikki ein treyt, men fyri-munur, at viðkomandi hava arbeiðsroyndir innan nevnda arbeiðsøki.

**Setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Verkfrøðingafelag og Fíggjarmálaráðið.
Tey, ið sett verða, skulu kunna góðtaka at verða flutt millum ymiskar uppgávur innan býtisvirkini og at skula ferðast kring landið eftir tørvi, við tað at býtisvirkini hjá SEV eru kring alt landið.
Arbeiðsstaðið er í Tórshavn, og verður arbeitt á og út frá hesum arbeiðsstaði.

**Nærri upplýsingar** um størvini kunnu fáast við at venda sær til Klæmint Weihe, stjóra ella Finn Jakobsen, deildarstjóra, báðir á tlf. 346800.

**Umsóknir** skulu saman við prógvum og møgu-ligum ummælum sendast elfelagnum SEV, Post-rúm 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 15. november 2005.

*Tórshavn, tann 26. oktober 2005.*
**Elfelagið SEV**

# Kunngerð

## um uttangarðsútskiftingar-fund á Selatrað

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund mikudagin 9. november kl. 13.00 í gamla skúla.

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum Garðahagi, Innari.

Útskiftingin verður endað.

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útsk. form.